LÓG FYRI
BYGDASAVN Í RUNAVÍKAR KOMMUNU

§ 1. Felagið Forni setur á stovn bygdasavn.

§ 2. Endamálið hjá savninum er í Runavíkar kommunu at fremja varðveitingararbeiði hjá felagnum Forni av fornminnum,forngripum og skjølum, at savna forngripir, merkja og skráseta teir við øllum upplýsingum, sum møguligt er at fáa til vega, at seta upp siðsøguliga framsýning.

§ 3. Savnið verður stýrt av nevndini í Felagnum "Forna", víðkað við einum limi, sum Runavíkar býráð tilnevnir. Stýrið skipar seg sjálvt. Stýrið savnsins stendur til svars fyri aðalfundi íFelagnum "Forna" av ognum og rakstri hjá savninum. Roknskaparárið er álmanakkaárið. Samtyktir stýrisins verða gjørdar við vanligum meiriluta. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi

§ 4. Til veðsetan av fastari ogn savnsins krevst stýrissamtykt og undirskrift frá formanni og 2 nevndarlimum.

§ 5. Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir grein 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 av 9.mei 1972 (við seinri broytingum) um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi hjá Felagnum "Forna" 1o. september 1986 og broytt í samband við góðkenning landsstýrisins.

Góðkent á eykaaðalfundi 23. apríl 1987.

Maria Jacobsen
Johan Hansen

Karin Kastalag
Símun Mittún

Jónsvein Knudsen

VALDUR AV RUNAVÍKAR KOMMUNU

Johan Fr. Lamhauge, form.

4730

Góðkend.

FØROYA LANDSSTÝRI, 21. mai 1987